# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Dagstovnurin í Løkjatúni, Argir:

## Fyrsti dagstovnur við trimum tilboðum



*Dagstovnurin í Løkjatúni á Argjum er tann fyrsti við bæði vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla í sama stovni*



*Charlottu á Váli Olsen er leiðari á Dagstovninum í Løkjatúni*



*Børnini á stovninum vóru spent til móttøkuna*

**Fríggjadagin 29. oktober var móttøka í sambandi við at Dagstovnurin í Løkjatúni á Argjum er tikin í brúk. Sum nakað nýtt er talan um vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla í sama stovni, sum er normeraður til 72 børn**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Nógvir nýggir dagstovnar eru tiknir í brúk í Tórshavnar kommunu í ár. Fyri stuttum læt ein nýggjur dagstovnur upp við Landavegin og ein í Maritugøtu í Hoyvík.

16. august læt Dagstovnurin í Løkjatúni á Argjum upp fyri teimum fyrstu børnunum, og fríggjadagin 29. oktober var so almenn móttøka á stovninum.

Jan Christiansen, borgarstjóri beyð øllum at vera vælkomin og Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, og Charlotta á Váli Olsen, leiðari á stovnin, hildu røðu. Eisini sang eitt kór við børnum í frítíðarskúlanum.

Sum tann fyrsti av sínum slagi er talan um bæði vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla í sama stovni.

Janus Sørensen, arkitektur, hevur teknað og Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari, hevur staðið fyri byggingini.

Stovnurin er normeraður til 72 børn, vøggustova til 12, barnagarður til 20 og frítíðarskúli til 40 børn.

Umframt leiðaran, Charlottu á Váli Olsen, eru 12 starvsfólk á stovninum.



*Óla Hans Olsen, Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóri hjá býráðnum, og Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini*



*Børn í frítíðarskúlanum syngja á móttøkuni*



*Jan Christiansen, borgarstjóri, handar Charlottu á Váli Olsen, leiðara á stovninum, ein málning av skyldmanni hennara, Torbjørn Olsen*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 25 ár í Flogvápninum

1. november hevði flogserfrøðingurin Hanus Lamhauge av Glyvrum 25 ára starvsdag í Flogvápninum, har hann meginpartin av tíðini hevur verið í tænastu í Føroyum.

Hanus Lamhauge er upprunaliga útbúgvin sum elektrikari í Føroyum. Eftir lokna lærutíð fór hann í herin at røkja sína herskyldu og at víðariútbúgva seg innan el. Hetta skuldi vísa seg at verða byrjanin upp á eina spennandi og fjølbroytta yrkisleið við tænastu bæði í Føroyum og Danmark, og í einum av heimsins brennideplum.

Fyri 25 árum síðani fór Hanus sum konstápulnæmingur á Serskúlan hjá Loftflotanum, sum er Flogstøðin Værløse í Keypmannahavn.

Longu í mai í 1980 bleiv hann sendur til Flogstøðina í Tórshavn at arbeiða, har hann var í tænastu í fimm ár í sambandi við umbygging av radarstøðini á Sornfelli.

Eftir hetta fór familjan í 1985 til Danmarkar, har Hanus í tvey ár var í tænastu sum ravmagnsmekanikkari á einari minni radarstøð í Hillerød á Norður-Sælandi.

Í 1987 fekk familjan Lamhauge aftur fráfaringarboð at fara upp aftur til oyggjarnar í Atlantshavinum, sum tey eru so góð við. Har fór Hanus aftur í sítt gamla starv, sum »chef-elektrikkari« í tí kenda umhvørvinum á toppinum av Sornfelli.

Eftir 12 ár á Sornfelli, fekk Hanus í 1999 brádliga brúk fyri sínum royndum sum hermaður. Í einum av heimsins brennideplum, fyrrverandi Jugoslavia, var brádliga tørvur á fólki, sum høvdu so margfaldaðar eginleikar, sum Hanus kundi bjóða. Innan stutta tíð varð avrátt, at hann skuldi fara avstað saman við konuni Meiken.

Hanus sat brádliga við einum høvuðsleikluti sum camp-arbeiðari í Camp Danevirke, Doboj, har hann fyri sín lut varð heiðraður við NATO heiðursmerkinum.

Eftir stutta skúlagond í 2000 á Flogstøðini í Skagen, gekk leiðin heimaftur til Føroya. Har hevur Hanus síðani verið í sama starvi hjá Ravmagnstænastuni, sum viðlíkaheldur el-verk, vatn, hita og útluftingar hjá Færøernes Kommando í Mjørkadali.

Hanus Lamhauge eru giftur við Meiken og hava tey trý børn. Clement, 16 ár, Marlan, 19 ár og Rúna 26 ár. Tey hava verið búsitandi á Glyvrum síðani 1989, har Hanus fær dyrkað eitt av sínum stóru frítíðarítrivum, sum er havfiskiskapur.



## Fyrstu jólapakkarnir av landinum

Seinastu vikurnar hava skógvahandlarnir havt eitt serligt slag av viðskiftafólki, ið hava havt størri áhuga fyri tómum skógvaeskjum, heldur enn snotiliga fótbúnaðinum á handilshyllunum.

Beinleiðis orsøkin er átakið Operation Christmas Child, og ikki kann sigast annað enn, at fólk hava tikið væl undir við átakinum.

Átakið Operation Christmas Child hevur mong ár á baki, og í fjør vórðu savnaðar yvir 6,6 milliónir skógvaeskjur við tinganesti í ymsum londum, sum vórðu latnar líðandi børnum í 95 londum. Felagsskapurin aftanfyri Operation Christmas Child er Samaritan's Purse, ið er ein kristin hjálparfelagsskapur. Franklin Graham, sonur prædikumannin Billy Graham, er leiðari fyri felagsskapinum.



*Myndin sýnir eina rúgvu av stóru rúgvuni av skógvaeskjunum, sum eru savnaðar saman í Føroyum seinastu vikurnar. Eskjurnar á myndini koma úr Suðuroynni, umframt úr sunnudagsskúlanum í Ebenezer*

Í høvuðsheitum snýr átakið seg um at fylla eina tómu skógvaeskju við ymiskum til drong ella gentu í einum ávísum aldursbólki. At brúka júst eina skógvaeskju hevur tað frágreiðing, at tær eru javnt stórar, og tí verður ikki mismunur gjørdur á støddini á gávunum.

Nú arbeiðið í Føroyum fyri í ár er liðugt, og skógvaeskjurnar eru savnaðar í avskipingarhølunum hjá Skipafelagnum, klárar at verða avskipaðar til Bretlands, gongur sjón fyri søgn, at føroysk børn, foreldur, ommur og abbar hava eitt stórt hjartað, tá talan er um at rætta eina hjálpandi hond til neyðstødd børn úti í heimi. Mong úti um oyggjaland okkara hava lagt tíð og pening í at geva eina persónliga kærleiksgávu til eitt treingjandi barn úti í heimi. Saman við ymsum tinganesti er eisini ein persónlig heilsa, so barnið veit, hvaðani gávan eri.

Gávueskjurnar er pakkaðar inn í jólapáppír, tí hetta skal verða ein jólagáva, sum umframt at gleða barnið við tí sum er í eskjuni, eisin skal minna tað á bestu jólagávuna, sum givin er. Lesnaður verður lagdur við í eskjunar í Bretlandi, og hesin lesnaður greiðir frá um Gud sum gav Jesus, heiminum til frelsara, og hvørs føðing vit minnast á jólum

## Úrslit umleið eina milliard danskar krónur

**Kaupthing Bank hevur higartil í ár forvunnið nærum eina milliard krónur**

BANKAVIRKSEMI
*tíðindaskriv*

Úrslitið hjá Kaupthing Bank, fyrstu 9 mánaðirnar av 2004, gjørdist 995 milliónir danskar krónur. Hetta er ein hækking á 130,5% sammett við sama tíðarskeið í fjør. Í triðja ársfjórðingi varð úrslitið 468 milliónir dkr ella ein hækking á 175,4%.

Rentingin av eginpeninginum, eftir skatt, gjørdist 32,5% sammett við 21,2% fyrstu 9 mánaðirnar í 2003.

Úrslitið av fíggjarpostum fyrstu 9 mánaðirnar varð 2.920 milliónir dkr, ein hækking á 54,3%. Rakstrarútreiðslurnar gjørdust 1.397 milliónir dkr svarandi til eina hækking á 22,7% sammett við árið fyri.

Í mun til fyri einum ári síðani, er javnin hjá Kaupthing Bank hækkaður 172,4% í 129 milliardir dkr.

Í sambandi við keypið av danska bankanum FIH fór kapitalhækking fram í Kaupthing Banka í august svarandi til 3.366 milliónir dkr. Aftur í oktobur fór kapitalhækking fram fyri at styrkja fíggjarliga grundarlagið hjá bankanum.

– Hetta er eitt sera gott úrslit – serliga tá stóri vøksturin í bankanum verður havdur í huga, sigur Peter Holm, stjóri hjá Kaupthing í Føroyum.

## Tøkk



Eg vil takka øllum, ið mintust til mín á mínum 98 ára føðingardegi 11. september og gjørdu mær dagin so hugnaligan.

Gud vælsigni tykkum.

**Alma Frederiksen, Miðvágur**

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, hjálp, blómur og kransar, tá kæra mamma, omma, langomma og olduromma okkara

**Kaja Arge**

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*

**Guðny, Turið og Sverri**

## Tøkk

Vit takka øllum tykkum sum hjálptu okkum og sýndu samkenslu tá góða mamma okkara

**Mary Judith Persson**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

**Børnini**

## Dagurin

3. oktober. Hubertus, deyður ár 727. Hann var biskupur í Maastricht eftir Lambertus. Var tiltikin veiðimaður og gjørdist verndarhalgimenni hjá øllum veiðimonnum. Halgisøgan sigur, at hann legði veiðiferðirnar av, tá ið hann ein dagin sá ein hjørt við einum lýsandi krossi millum hornini. Í mongum londum verða havdar sonevndar hubertusveiðiferðir. Haruskjótingin í Føroyum, sum er um hetta mundið, kann sigast at vera ein leivdin av hesum siði.
Týskt navn, samansett av orðum, sum merkja *hugur* og *bjartur.*